# *Føroysk klæðir*

*Søguligt yvirlit*

*Nicolina Jensen*

**Inngangur**

Tá eg í hesum føri skrivi um føroysk klæðir, er tað um stásklæðini, tey, vit í dag kalla føroysk klæði ella føroyskan búna.

Endamálið við skrivingini er at geva eitt yvirlit út frá tí, ið skrivað er frammanundan, um klæði, ið Fornminnissavnið eigur, og tí, ið eg sjálv havi savnað saman hesi seinastu árini.



Fróðskaparrit 36.-37. bók (1988-89): 117-140

Ikki ber til at fáa alt við, tí havi eg valt at endurgeva hesar persónar, fyri søguliga at vísa á, hvat skrivað hevur verið um klæðini við ávísum áramáli ímillum.

Lucas Debes umboðar tíðina um 1600-1700, Jens Chr. Svabo og Jørgen Landt tíðina 1775-1800, Carl Julian Graba tíðina um 1825, Hans J.J. Sørensen tíðina um 1850, Hans M. Debes tíðina seinast í 19. og fyrst í 20. øld. Sjálv geri eg egnar viðmerkingar.

Umframt hesar áðurnevndu persónar, ið viðgera tey føroysku klæðini sum heild, havi eg endurgivið í brotum Elsu Bærentsen, Petru Djurhuus, Jóhonnu Mariu Skylv Hansen, Marionnu í Kongsstovu, Helenu Patursson, Andrias Djurhuus, Jens Chr. Djurhuus, J.P. Gregoriussen og Poul Nolsøe. Hesi umboða eisini tíðina seinast í 19. og fyrst í 20. øld. Úr tilfari, eg ikki havi tikið við her, er vert at nevna greiningina av myndunum hjá Born frá 1790-árunum, sum Arne Thorsteinsson og Jóan Pauli Joensen skrivaðu í Mondli nr. 3, 1977.

Í tekstinum vísi eg ikki til blaðsíðutal í hvørjum einstøkum føri, men geri tað í staðin í sjálvum bókmentayvirlitinum, so at tey, sum hava áhuga, kunnu finna fram til tað.

**Frágreiðing um klæðir**

Um frágreiðingin skal vera eftirfarandi, er neyðugt, at hann, ið skrivar, hevur innlit í evnið eins og hann, ið lesur, so til ber at hugsa og ivast.

Til ber, við fáum og einføldum orðum, at siga frá tí mest týðandi við einum plaggi, sum til dømis, tá ið Jóhannes apostul sigur Jesusar kyrtil vera uttan seym, vovnan í einum, ella tá ið íslendingar í fyrstu bíbliutýðing síni 1584 siga kyrtilin vera bundnan. Til ber eisini at skriva um klæðini sum heild, greina tey sundur og siga frá hvørjum plaggi sær, eins og gjørt verður í Mósebók, tá ið greitt verður frá prestabúnum Árons.

Sjálv havi eg valt at greiða frá hvørjum plaggi sær, so lættari verður at leita eftir frágreiðing um einstøk plagg.

Tá endurgivið verður á donskum, er tað fyri at eg ikki við óvilja skal mistulka setningar sum t.d. hendan: „Skjørtet er enten Ainskefta, eller stribet, lignende Hvergarn". „Stribet" kann í hesum føri eins væl vera spølut og teinut, spølut, ella bara teinut, sum bæði í íseting og útsjónd er hvørt sítt. Spølur er breiðari enn teinur.

**Stakkur**

*Lucas Debes* sigı frá kjóla, sum er seymaður við nógvum føllum í skjúrtinum. Hesin kjólin er seymaður úr klæði, antin myrkabláum ella reyðum, er prýddur framman um ermarnar við reyðum klæði, svørtum floyalsbondum og frynsum. Framman er stórt bryst við frynsum í erva og røðum av bordum ella snórum; møguliga er hetta stimin, hann skrivar um. Ovast í brystinum er gylt brosja, fýrkantað sum ein rútari, við smáum leyshangandi bløðum; brosjan er fest ígjøgnum hálsklútin og brystið. Lucas Debes skrivar einki meir um hálsklútin, hvørki hvussu hann sær út, ella úr hvørjum toyi hann er seymaður. Lucas Debes sigur tey, sum minni formáddu sær, hava sama slag brosju, men úr messing. Beltini vóru úr messing.

*J.Chr. Svabo* skrivar tað sama sum Lucas Debes um sjálvan stakkin, nevnir einki um



ermarnar, ei heldur um frynsarnar á brystinum. Harafturímóti sigur hann stakkin hava silvurmallur, floyalsbelti við áseymaðum silvurkúlum og somu brosju, sum Lucas Debes skrivar um. J.Chr. Svabo sigur brosjuna ringla við minstu rørslu, men at tað als ikki er nakað óljóð. Um stakkin sigur J.Chr. Svabo, at hann er sjáldnari at síggja nú enn fyrr.

*Jørgen Landt* skrivar tað sama um sjálvan stakkin sum teir báðir frammanundan, men sigur ermarnar nú hava floyalsuppslag við áseymaðum knipplingum. Um hálsin og uttan á kjólanum er fínt hvítt turriklæði við breiðum knipplingskantum. Hetta er møguliga ein dupultkragi, sum vit kenna hann nú á døgum. Brosjan er tann sama, men beltið, ið er av reyðum floyali við silvurkúlum, hevur fingið silvurspenni. Bæði J.Chr. Svabo og Jørgen Landt siga, at annar endin á beltinum hongur niður framman.

Hvørki *C.J. Graba* ella *H.J.J. Sørensen* nevna stakkin.

*H.M. Debes* skrivar í Jólastjørnuni 1966, at tríggir litir vóru brúktir til stakkin: skarlaksreytt, grasgrønt og himmalblátt. Tann blái liturin var mest brúktur. H.M. Debes sigur lívið vera seymað við flundruryggi („prinsessefacon“), annars skjúrtið lagt í føll, sum áður nevnt. Um ermuna sigur hann, at hon er long og smøl við lítlum uppslag og pípaðari blondu framman. Stakkabrystið og uppsløgini høvdu annan lit. Stakkurin var vanliga úr fínum klæði (klæði merkir í hesum føri sernavnið á ávísum toyi) ella øðrum ullintum toyi. Til stakkin hoyrdi silvurbelti, mallur, stimi og stakkanál, sum eisini var úr silvuri. Um hálsin silkikragi. H.M. Debes sigur, at tá ið stakkurin var brúktur til brúð-



*Stakkastás umleið 1720*

arstás, hevði brúðurin hvítt fyriklæði við knipplingum aftan á vígsluna.

H.M. Debes sigur abbadóttur Peter Hellesen Viborg próst, Súsonnu Kristiansdóttur, húsfrúgv av Oyri, eiga himmalbláan stakk, stakkastás av reyðargulli og belti við sprota. Eisini sigur hann stakkanál vera í Stórustovu í Oyndarfirði. Hon skuldi vera frá tíð Christians IV, 1577-1648.

Fornminnissavnið eigur tíverri ongan stakk, men harafturímóti stakkastás, bæði brosju og belti frá umleið 1720, í útsjónd samsvarandi stakkastásinum, Lucas Debes skrivar um í 1673.

Nær farið verður at brúka silki, eri eg ikki før fyri at siga nakað um. Tað er tað vanligasta í dag. Litirnir eru ymiskir, reyðir, bláir, grønir og myrkt violettir. Eisini veit eg um brúður í hvítum silkistakki. Brúður í Kvívík fyri 50 árum síðan hevði svartan stakk úr klæði við reyðum brysti og mansjettum, hvítum blondum um ermarnar og hvítum dupultkraga við blondu. Stakkastásið var úr silvuri.

**Høvuðbúnin**

*Lucas Debes* sigur gentur ganga hattleysar, men konurnar hava reyðar, vældøvdar hálendskar húgvur, ið bert fjala helvtina av høvdinum.

*J.Chr. Svabo* sigur brúður hava krans um høvdið av blomstrum og bondum, ið varð kallað válkur, men konurnar hava húgvu.

*Jørgen Landt* sigur hárið vera flættað í tvær flættur, lagdar runt um høvdið sum ein krans, møguliga tað, vit kalla rósinkrans. Uttaná verður settur válkur, sum er ein púta ella kransur, prýddur við ymist littum silkibondum, deils vovin við silvur- og gulltræðrum ella íseymaðum stráperlum. 4 silkibond 1 1/2 alin long verða fest í aftan. Tvey av teimum verða tikin framum og hanga niður á bróstið. Um brúðurin er einkja ella hevur átt barn áður, skal hon hava eina reyða húgvu undir kransinum.

*H.M. Debes* skrivar, at til stakkin sum brúðarbúna hoyrir krúna úr silkibondum, hetta er møguliga tað sama sum válkurin. Tá stakkurin í dag verður brúktur sum brúðarbúni, hevur brúðurin krúnu ella diadem, gylt ella úr silvuri samsvarandi stakkastásinum.



*Guðný Patursson*

**Sokkar og skógvar**

*Lucas Debes* skrivar einki um sokkar, nevnir bert rotuskógvar.

Hvørki *Jens Chr. Svabo* ella *Jørgen Landt* skriva um sokkar ella skógvar í sambandi við stakkin.

*H.M. Debes* skrivar, at brúktir verða hvítir ella reyðir sokkar, men skrivar einki um skógvar.

Í dag verða brúktir nylonsokkar, ið hóska til litin á stakkinum, somuleiðis svartir ella brúnligir sokkalitir. Í flestum førum eru skógvarnir teir somu sum til tey føroysku klæðini, svartir við silvurspenni, í undantøkum hava teir sama lit sum stakkurin.

## *Kvinnubúnin – tann sami sum í dag við ymsum broytingum*

**Troyggjan**

*Lucas Debes* sigur kvinnubúnan vera eintáttaðan bæði hjá ríkum og fátækum, kjólin seymaður á sama hátt sum stakkurin, bert úr grovari tilfari.

*J.Chr. Svabo* skrivar um búnan í sama líki, vit kenna hann í dag. J.Chr. Svabo sigur troyggjuna verða bundna við tveimum ella trimum litum, fagurreyðum, bláum ella krapp.

*Jørgen Landt* sigur troyggjuna vera bundna við smáum mynstrum, fagurreyða og hvíta ella fagurreyða og bláa ella myrkabláa, svarta og ljósabláa. Eisini skrivar hann um myrkavioletta troyggju, bundna, skorna upp framman, snørda antin við hektum og mallum ella bert við tinmallum.

*C.J. Graba* sigur troyggjuna vera korkalitta, bundna, opna framman, knepta við krókum og lykkjum ella stimaða við stoyptum tinringum.

*H.J.J. Sørensen* sigur troyggjuna vera myrka, bundna, skorna upp framman, snørda við

myrkum lissum, so hon samstundis gjørdi nyttu sum snørilív. Troyggjan hevði stuttar ermar.

*H.M. Debes* skrivar, at somu mynstur verða bundin sum áður, men troyggjan sjálv hevur skift skap, hon verður stimað ov høgt upp. Áður kom stimingin bert upp undir bróstini. Hetta gav kvinnuni eitt nógv vakrari skap. H.M. Debes sigur eisini, at bregdað band í tveimum litum skal vera um, í erva og um ermarnar.

Á Fornminnissavninum eru fleiri rættiliga gamlar troyggjur. Tíverri vantar okkum frágreiðing um tær fyrst innkomnu. Har er einlitt myrkablá tvíbundin, einlitt reyð við rangbundnum mynstri, tvílitt, reyð við myrkabláum mynstri, trílitt, reyð við myrkabláum og hvítum mynstri. Tann hvíti tráðurin er úr bummull. Síðani eru tvær tvílittar, reyðar og svartar, onnur bundin í Havn og hin í Kvívík uml. 1850. Mynstrini í báðum troyggjunum eru at finna í bókini „Føroysk Bindingarmynstur". Báðar troyggjurnar eru eitrandi fínt bundnar. Í skapi eru tær líkar troyggjunum nú á døgum, bert minni í støðd.

Vanliga troyggjan í dag er tvílitt, antin reyð og myrkablá ella reyð og svørt, ella myrkablá og ljósari blá. Tó havi eg sæð nakrar fáar trílittar, reyða við myrkabláum og hvítum og reyða við myrkabláum og ljósari bláum. Í skapi eru flestar troyggjur eins og tann myrkavioletta sum Jørgen Landt skrivar um í 1800. Mynstrini eru tey somu, sum eru at finna í bókini „Føroysk Bindingarmynstur". Troyggjurnar eru kantaðar upp framman við bregdaðum bandi ella svørtum floyali. Fyrr var oftast kantað við bummull ella silki. Nú verða bert brúktar silvurmallur, fyrr var tað krókar og lykkjur ella tinmallur.

**Brystið**

*Lucas Debes* og *J.Chr. Svabo* skriva um bryst í sambandi við stakkin, men ikki troyggjuna. *J. Landt* nevnir ikki brystið. *C.J. Graba* sigur troyggjurnar verða kneptar saman við krókum og lykkjum ella stimaðar við tinringum, so tær eru átøkar brysti.

*H.J.J. Sørensen* sigur troyggjuna vera snørda við lissum, men sigur einki um brystið.

*H.M. Debes* sigur brystini vera væl og fast bundin úr fínum vælnappaðum tógvi – bundin sum eitt hosuleggald – avtikin – síðani væl tøvd, litað svørt ella myrkablá, klipt upp, rundað av í erva um leið 1 cm, fóðrað og sett bregdað band runt um.

Kona frá Gjógv segði mær, at hon mintist mynsturbundið bryst, reytt og myrkablátt til einlitta troyggju, mynstrið var áttablaðastjørnan. Í dag verður mest brúkt svart floyal ella klæði, ofta fóðrað við reyðum silki.

**Skjúrtið**

*Lucas Debes* sigur einki um skjúrtið. *J.Chr. Svabo* sigur skjúrtið antin vera einskeftað ella spølut, líkt „hvergarnstoyi". *J. Landt* sigur skjúrtini vera brún úr „hvergarnstoyi", hvítspølut til gerandis og gulspølut til heiligdags. *C.J. Graba* sigur einki um skjúrtið. *H.J.J. Sørensen* sigur skjúrtið vera myrkt ullint við spølum. *H.M. Debes* sigur skjúrtini hava verið vovin í fimm litum, men altíð myrkablá í botni. Til eldri vóru tey myrkablá og ljósari blá, sum vóru rópt myrk og ljós skjúrt. Eisini vóru tey vovin reyð, blá og hvít – myrkablá, ljósablá og reyð-myrkablá við gulum og grønum spølum og so tey myrkabláu og reyðu, sum jú eru tey, ið nú mest

verða brúkt. H.M. Debes er harmur um, at tey eru farin at veva reyð og svørt, og sigur tann myrkabláa vera upprunalitin.

H.M. Debes sigur, at skjúrtini eiga at hava 13 føll á hvørjari lið, og miðfallið framman eigur at vera eina stuttasponn. Ofta er tað so, at ung genta fær skjúrt, møguliga longu í fermingaraldri. Tá ið so gentan eldist, og skjúrtið verður ov trongt, ber væl til at fækka um føllini, og soleiðis vaksa um skjúrtið. Av hesi orsøk er ikki altíð lætt at vita, hvussu nógv føll upprunaliga hava verið á gomlum skjúrtum. Vanligastu skjúrtini í dag eru myrkablá og reyð ella svørt og reyð við hallaspølum, tó havi eg sæð nýggj bæði trí- og fýralitt.

Fornminnissavnið eigur fleiri gomul skjúrt, bæði myrkablá og ljósari blá – myrkablá og gulgrøn – myrkablá og reyð og eitt nýggjari svart og reytt. Øll eru tey úr „hvergarnstoyi", ísett við ullintum og vovin við tvisti (bummull). Ymist er, hvussu hesi skjúrt hava verið kallað: summi siga teinaskjúrt, onnur spølaskjúrt og uppaftur onnur føroyskt skjúrt. Í Nólsoy siga tey einstøðingar um skjúrt, har spølirnir eru eins breiðir og hallaspølir, tá rent verður aðruhvørja ferð spøl og teinur. Spølur er breiðari enn teinur.

**Viðmerkingar til J. Chr. Svabo:**

*J. Chr. Svabo* sigur skjúrtið antin vera einskeftað ella spølut, líkt „hvergarni". „Hvergarnstoy" er hálvullint, antin bummull ella hør mótvegis ull. J. Chr. Svabo sigur, at tað vanligasta, ið vovið verður, er trískeftað og einskeftað, tað einskeftaða til segl og skjúrtur. Skjúrtur merkir møguliga í hesum føri stúkur. J. Chr. Svabo sigur annað toy verða vovið til konufólkaklæðir, ið líkist „hvergarnstoyi" rættiliga væl. Toyið er spølað við ymsum litum, bæði inn- og útlendskum. Óhugsandi er ikki, at spølaskjúrtini koma við flatvevinum, tá ið J. Chr. Svabo ger skilnað ímillum einskeftað og „hvergarnstoyið". Einskeftað kann bert sigast við røttum um klæði vovið í klíggjavevi. Verður sama klæði vovið í flatvevi við skøftum, eitur tað tvískeftað ella føriftsvond. Tá ið J.Chr. Svabo sigur trískeftað, er hetta ivaleyst tað sama sum fýrskeftað vaðmal í flatvevi.

Klíggjavevsmáliskur verða nýttar bæði í Føroyum og Íslandi um flatvevsvevnað.

Í Bergen sá eg gamalt hallaspølað skjúrt, myrkablátt og reytt, komið úr Sogndali. Í útsjónd meinlíkt okkara.

Í Føringatíðindum nr. 11, 1897 gevur gomul vevkona ilt av sær um húgvu, ið fæst í handlinum. Hon skrivar í klombrum: (sokallað føroysk húgva). Um vevingina sigur hon, í staðin fyri at vera vovin av tvistgarni og ullintum vefti, var hon vovin við ullintum garni og tvistvefti av einkultum tráð, og harvið er hon rondut tvørtur um stykkið – við undirskjúrtavond.

Hetta er áhugavert, tí júst soleiðis verða føroysk skjúrt vovin nú.

Aftursvarið frá Britu stendur í Føringatíðindum nr. 12, 1897. Hon sigur at onnurhvør av teimum reyðu strikunum er smøl og onnurhvør breið, tó so at fjórðahvør er breiðast. Hetta var húgvutoy, ið Jóannes bóndi Patursson læt veva í útlondum.

**Turriklæðið**

*J.Chr. Svabo* skrivar um hvítt turriklæði úr fínum lørifti, lagt kant í kant, og eisini nevnir hann silkiturriklæði, men ongan lit.

*J. Landt* skrivar um hvít og litt turriklæði, men nevnir ongan lit, ei heldur nakað um tilfarið. *C.J. Graba* sigur konufólkini bera





*Kvinnubúnar fyrst í 1900*

hvítar skjúrtur, men nevnir einki um turriklæðið. *H.J.J. Sørensen* sigur turriklæðini vera úr silki ella fronskum merino, løgd horn í horn. *H.M. Debes* sigur, at turriklæðini altíð vóru úr ullmusselini ella silki og løgd í trý føll í nakkanum. Frammanfyri vóru tey løgd ógvuliga varliga niður undir brystið. H.M. Debes nevnir einki um lit. Á gomlum myndum síggja vit oftast, at turriklæðini hanga leys niður framman. Hetta er púra burturdottið, og verða turriklæðini nú løgd í føll innan fyri brystið.

Fornminnissavnið eigur fleiri gomul turriklæði úr ymiskum tilfari, ljós bummullarturriklæði við ymist littum mynstrum, einlitt reytt, ullint broderað við gulgrønum ketu-

seymi, svart ullint, broderað við ymist littum ullgarni og mong onnur.

Turriklæðini nú á døgum eru bæði marglitt og fjølbroytt, bæði í útsjónd og tilfari, ofta í liti samsvarandi við fyriklæðið. Tað eru blomstrut turriklæði, ullint, ella úr blandaðum tilfari, vovin turriklæði, spølut og teinut, úr ull, silkilíni ella bummull, broderað turriklæði bæði úr ull, musselini og silki. Frynsað við tilfari samsvarandi turriklæðnum.

Myndir frá uml. 1900 vísa, at turriklæðini hava sitið øðrvísi, enn tey gera í dag. Antin vóru tey uttan á stimanum, fest við eini brosju, ella løgd inn um stiman, tó uttan bryst. Myndirnar vísa eisini, hvussu stutt upp troyggjurnar vóru stimaðar.

**Fyriklæðið**

*J.Chr. Svabo* sigur fyriklæðið vera úr bláspølutum lørifti. *J. Landt* sigur fyriklæðið vera bláputut. *C.J. Graba* sigur viðhvørt, men sjáldan, verða nýtt bláputut fyriklæði. *H.J.J. Sørensen* sigur einki um fyriklæðið. *H.M. Debes* sigur fyriklæðini vera úr ullmusselini, silki ella øðrum tílíkum.

Støddin var ein onnur enn nú. Tey vóru eina alin long og rykt framman, til tey máldu eina langasponn undir líningini. Tey nú so nógv nýttu bordafyriklæðini komu í handlarnar um aldaskiftið og vóru rópt svenskar bordasvintur, serliga væl umtóktar í hoyna, tá dentur var lagdur á at hava so vakrar svintur sum gjørligt. Hesar umtalaðu bordasvintur hava verið sera væl umtóktar til dagin í dag, ofta vovnar úr fínum ullgarni, silkilíni ella bummull og ull, við marglittum rósugangsbordum. Annars eru fyriklæðini í útsjónd og tilfari samsvarandi áður umrøddu turriklæðum.

Fornminnissavnið eigur ymisk gomul fyriklæði, úr silki, bummull, og nýggjari úr silkilíni og ull.

**Kýsar**

*J.Chr. Svabo* sigur vanligastan vera tvey- ella trístykkiskýsa. *J. Landt* nevnir bara trístykkiskýsan. *C.J. Graba* sigur konufólkini hava hvít ella marglitt høvuðklæði ella kýsa av kattun. *H.J.J. Sørensen* skrivar um litta nakkahúgvu, (sum helst er tað sama sum kýsi). *H.M. Debes* sigur kýsarnar altíð vera myrkar, ymist littar við ymist littum silkibondum. Yngri fólk brúktu altíð reyð bond og tey eldru blá, tann ið bar sorg, myrkablá. H.M. Debes skrivar eisini um „beskerd" bond – tey vóru blomstrut og høvdu smátungutan kant, og tey vórðu ofta brúkt til strimlakýsan. Strimlakýsin ella trístykkiskýsin hevði ein 2-3 tummar breiðan pípaðan blondustrimmil, sum var breiðastur framman, og sum smalkaðist aftur um oyrini. Runt um kýsan var sett ein gullagraman, sum kallað var gulltægrir.

Fornminnissavnið eigur stórt tal av kýsum, bæði tvey-, trístykkis- og strimlakýsum. Flestir eru úr brokadu ella silki, bæði einlittir og blomstrutir. Nú er vanligast við tveystykkiskýsum, oftast myrkir úr brokadu, við ymist littum silkibondum. Um turriklæðið og fyriklæðið eru broderað, samsvarar kýsin oftast við broderí og tilfar.

**Sokkar**

*J.Chr. Svabo* sigur sokkarnar antin vera svartar ella korkaðar, og eru teir tá helst bundnir úr føroyskum tógvi. *J. Landt, C.J. Graba* og *H.J.J. Sørensen* nevna bara svartar sokkar. *H.M. Debes* nevnir bara sokkalit til stakkin.



*Jóannes Simonsen (sonur Hanus í Skálavík) og systirin Jenny.*
*Myndin er tikin hjá Kristinu í Gøtu í atelierinum, sum var yvir av Sam Olsen, har Kristina var, áðrenn hon fór oman í bókhandilin.*

Nú verða mest brúktir svartir ella brúnligir nylonsokkar.

**Skógvar**
*Lucas Debes* og *J. Chr. Svabo* nevna bert rotuskógvar. *C.J. Graba* sigur konufólkini ganga í føroyskum skóm, brúnum ella svørtum.

*H.J.J. Sørensen* sigur, at uttan á rotuskónum hava tær tuflur ella galosjur. H.M. Debes sigur einki um skógvar.

Nú verða brúktir svartaskógvar, oftast við silvurspenni á.

**Uttanáplagg**
Hvørki *Lucas Debes, J.Chr. Svabo, J. Landt* ella *C.J. Graba* skriva nakað um uttanáplagg.

*H.J.J. Sørensen* sigur konufólkini brúka myrk sjal. *H.M. Debes* skrivar bara um kápur; hann sigur kápuna vera úr klæði ella silki. Kápan hevði somu longd aftan sum framman, 60-70 cm. Víddin í neðra var út ímóti trimum metrum. Kápan hevði tveir kragar, annar var uml. 8 cm breiður og skorin í tungur og lá út á herðarnar. Hin var ein flippa, ofta við revaskinni á. Kápan var opin framman og heft í hálsinum við einum messing- ella silvurspenni. Frammarlaga á liðini var opin „sliss“, sum gekk frá faldinum og upp á miðjuna.

Fornminnissavnið eigur somu kápu, sum H.M. Debes skrivar um, og fleiri aðrar.

Á ólavsøku, tá ið flestu føroysku klæðini eru at síggja, sæst onkur hendingakvinna í kápu – aloftast í møtli og í fleiri førum í bundnaturriklæði. Møttulin er ermaleysur eins og kápan, hann er síðari, røkkur niður á tjúkkan aftan og er rundaður upp framman, hevur lítlan kraga, seymaður sum skjúrtuflippa við rundaðum hornum, ongar knappar og onga „sliss“, bert silvurspenni undir øsinum, fóðraður við silki, oftast við reyðum ella bláum. Nær byrjað verður at brúka møttul, eri eg ikki før fyri at siga nakað um. Á Strondum er møttul arvaður úr Kollafirði, væl yvir 100 ára gamal. Møttulin er úr svørtum, tjúkkum klæði, er ófóðraður, hevur dupultan kraga. Tann størri røkkur niður á

akslarnar og er prýddur við svørtum repsbondum. Tann minni stendur nakað uppfrá uttan at vera seymaður sum skjúrtuflippa. Framman er møttulin prýddur við prýðisstikningum. Prýðisknappar hava verið, men eru burturtiknir.

Bundnaturriklæði sum prýðisplagg kom í brúk, aftan á at Elsa Bærentsen hevði endurbundið og skapað nýggj mynstur í sekstiárunum.

## *Mansbúnin*

### Sjóstúkan

*Lucas Debes* skrivar um stuttan, víðan „kjortel". *J.Chr. Svabo* skrivar um jakkasjóstúku, sum er svørt seyðalitt, víð og hongur leys um kroppin, røkkur niður á hálv lørini. Frá mjadnunum og niður er liðargeiri. Knapparnir eru antin av hvítum beini ella brúnir. Á akslunum er nælt (seymaður heksastingur) við togtráði (tráður spunnin úr broddi). J.Chr. Svabo sigur teir í Skúvoy hava ein eykageira mitt aftan. J.Chr. Svabo skrivar eisini um síðan kjóla av svertaðum vaðmali. Kjólin er ryktur við føllum á mjadnunum, og knapparnir eru av hestahári. Hann sigur eisini, at hesin kjólin er við at fara av móta, og í staðin er komin ein svartur vaðmalsvestur, sum er styttri og uttan føll.

*J. Landt* nevnir sama plaggið við trimum nøvnum: jakka, koftu ella sjóstúku. Liturin er myrkamorreyður, vaðmalið er tvískeftað, tætt og sterkt. Koftan røkkur niður á knøini, er víð um miðjuna, ryggurin er skorin í einum, og upp í síðurnar er settur liðargeiri Ermarnar eru seymaðar í einum, antin við seyminum innan- ella uttanarma. Ermarnar eru víðar í erva, sneiddar í neðra við stuttari „sliss" og einum knappi. Koftan hevur knappar framman, antin hvítar ella brúnar úr beini, sum fáast úr handlinum.

*C.J. Graba* skrivar, at sunnu- og halgidagar ber hin múgvandi føroyingurin svartan ullintan frakka, í sniði átøkan teim sonevndu skansafrakkunum, ella teimum, sum bøndur úr fyrru øld eru klæddir í á leikpallinum. Frakkin røkkur niður á knæ og er eins víður í erva sum í neðra, framman settur við knappum eftir allari síddini, og knappholini eru seymað reyð úr ullintum tráð.

*H.J.J. Sørensen* sigur teir eldru menninar brúka svarta vaðmalskápu, sjóstúku, sum røkkur niður á knøini, og eisini sigur hann tey vera farin at seyma koftuna styttri eins og stuttar yvirfrakkar.

*H.M. Debes* sigur seg hava lisið í bók um Dyveke, hjákonuna hjá Kristiani 2., at føroyingar, ið komnir vóru at hitta kong, vóru í svørtum koftum. Hetta hevur verið fyri 1517. H.M. Debes sigur tað hava verið tvinnanda sløg av sjóstúkum, ta stuttu, ið røkk oman ímóti knøunum, og hina síðu, ið røkk niður um hosubondini. H.M. Debes sigur sjóstúkuna vera glatta í erva við átta knappum niður framman og nógv útskráaða í neðra. Um kraga og akslaseym er seymað við sjóstúkunæling.

Fornminnissavnið eigur tvær sjóstúkur uml. 150 ára gamlar, onnur er úr Nólsoy og hin úr Saksun. Báðar eru svartar, annars í tilfari og útsjónd nágreiniliga eins og í frágreiðing J. Landts. Sjóstúkan úr Nólsoy er fórðað við bummull, hevur heilan rygg og liðargeirar, er 100 cm long, hevur 10 knapphol og 10 knappar (ein er burtur). Knapp-

arnir eru úr steinkoli. Erman hevur ein seym uttan, „sliss“ og ein knapp. Sjóstúkan hevur kotakraga, men onga næling. Sjóstúkan úr Saksun er ófóðrað, er 110 cm long, er seymað eins og tann úr Nólsoy, hevur 8 knapphol og 8 knappar úr steinkoli. Sjóstúkan er næld, bæði um ermagap, akslar og háls. Eitt skreyteintak av føroyskum handverki. Fornminnissavnið eigur eisini eitt frakkakot komið úr Kollafirði, uml. 100 ára gamalt. Frakkakotið er seymað sum jakki við flundruryggi („prinsessufacon“), er 46 cm langt, hevur kotakraga og lumma inn frá síðuni. Framman eru 8 knapphol og 8 knappar úr steinkoli. Frakkakotið er fóðrað við blomstrutum flonelli. Í skapi er frakkakotið rættiliga líkt tí, ið suðuroyingurin er í á standmyndini í Normansdalen. Myndin stendur í bókini *Føroyar I.*

Sjóstúkan í dag er eins og kjólin, J.Chr. Svabo skrivar um, uttan tað, at ikki verður rykt við føllum um mjadnarnar, bert sneitt ella seymað við liðargeira. Klæðið er svart handilsklæði, og knapparnir svartir. Stimaknapparnir eru úr silvuri.

**Viðmerkingar til J.Chr. Svabo:**

Samanborið við nútíðarklæðir minnir frágreiðingin um jakka ella sjóstúku meira um kot, og frágreiðingin um kjólan meira um sjóstúkuna, og tá ið J.Chr. Svabo síðani sigur, at í staðin fyri kjólan er komin svartur vaðmalsvestur, so hevur hetta heldur ikki somu merking sum vesturin nú. J.Chr. Svabo sigur vestin verða brúktan uttan á einum „kalamankesvesti“. Óhugsandi er ikki, at hetta er byrjan til knappatroyggjuna.

**Viðmerkingar til J. Landt:**

*J. Landt* skrivar sjálvur, at hann ikki skrivar úr egnum barmi, men hevur nýtt áður skrivaðar keldur. Hann hevur lisið J.Chr. Svabo, áðrenn hann skrivar um sjóstúkuna. J. Landt sigur vaðmalið vera tvískeftað. Her veldst um, hvørja vevmálisku hann hevur brúkt. Hevur hann skrivað eftir J.Chr. Svabo, er einskeftað vaðmal vovið í klíggjavevi, tað sama sum tvískeftað vaðmal vovið í flatvevi.

*Ellen Andersen* skrivar í bókini „Danske Dragter i Moden i 1700-årene“: „Den danske betegnelse *kjol* svarer til fransk *justaucorps.* Den stammer oprindelig fra en bondekofte med middelalderlige traditioner, dvs. en lang og vid overkjortel, med ret korte ærmer. Det er denne overkjortel, der blev annekteret af militæret og senere af civile under navnet kjol“. Óhugsandi er ikki, at navnið sjóstúka stavar frá tí franska justaucorps, sum bæði í úttalu og frágreiðing av sjálvum plagginum líkist rættiliga nógv.

**Kotið**

*Lucas Debes* skrivar um stuttan, víðan „Kiortel.“ *J.Chr. Svabo* skrivar um stuttan jakka, ið kallast „Koot“. Liturin er antin gráur ella blandaður brúnur og korki. Knapparnir eru stoyptir úr tini. *J. Landt* skrivar um jakka, koftu ella sjóstúku, men nevnir ikki kotið. Frágreiðingin um hetta plagg, ið eg áður havi viðmerkt undir sjóstúkuni, líkist rættiliga nógv kotinum.

*C.J. Graba* sigur stuttan jakka verða brúktan, sum íðuliga er seymaður úr hvítum vaðmali. *H.J.J. Sørensen* skrivar: „De Ældre bruge over denne Dragt en sort Vadmels Kofte (Sjóstúga), som nåer til Knæerne, man har også nu tildags begyndt at lade Koften sye som en kort Overfrakke“. Seinni sigur hann: „dog er Sjóstugan eller Kótet yderst“.

*H.M. Debes* skrivar einki um kotið, hóast tað í hansara tíð er eitt vanligt plagg.

Kotið verður nú seymað uttan liðargeira, sneitt inn ímóti miðjuni og út aftur upp undir hond. Ryggurin er heilskorin. Framman eru seks knapphol vinstrumegin og fimm svartir knappar og eitt knapphol ovast undir kraganum høgrumegin. Tey ovastu knappholini eru til stimaknapparnar, ið eru úr silvuri við ketu ímillum. Lummarnir eru innseymaðir (paspoleraðir) og venda upp og niður, nakað inn frá liðarseyminum. Ermarnar eru seymaðar sum jakkaermar við yvir- og undirermu, hjólaðar inn á bulin. Kragin sum hevur egið navn, kotakragi (kinaflipp), er 4 cm høgur, er stikkaður 6 ferðir eftir longdini. Væl er hjólað niðurúr fyri framman til kragan. Kotið er fóðrað við svørtum lastingi innan um bulin og ljósum teinutum skjúrtutoyi innan um ermarnar. Miðalstórt kot er 78 cm langt undan kraganum.

At ikki verður seymað við liðargeira, kemst helst av, at breiðari verður vovið. *Jóhanna M. Skylv Hansen* skrivar í bókini *Gamlar gøtur I*, at tað ganga 5 alin til eitt kot, men nevnir ikki breiddina. Hon sigur kotini verða stúkuskorin og við ongum fóðri uttan upp undir lummarnar. At kotini eisini hava verið ymisk til útsjóndar, skilja vit, tá vit lesa víðari. Ein maður, sum hevði búð millum vestanmenn og har fingið sær eitt kot, ið var seymað við teirra sniði (jakkaskorið), kom til Havnar at ferðast. Hann fer nú inn til ein gamlan havnarmann, ið hann var væl kendur við. Hesin gamli hyggur við og tekur í kotið, har liðargeirin átti at vera, og sigur: „Puff, kot er kot og jakki er jakki". Ein annar maður fór til Hvalbiar at fríggja og í stúkuskornum koti. Gentan, ið var eitt dugnafólk, biður hann smoyggja sær úr kotinum. Hann so ger, og hon skar kotið um aftur og seymaði tað væl og virðiliga eftir tí sniði, tey brúktu har um vegir.



Æra hevur altíð verið sett í at fáa so gott tilfar sum møguligt til kotið, sjálvt í bóndans garði var vald besta ull, og ikki altíð fekst hetta eftur einum ári. Tikið verður til at nappa so væl sum til kot og at spinna so fínt sum til kotagarn. Tað hevur ongantíð verið lætt at fingið fatur á góðum kotavaðmali, og

allarminst nú, tó hendir av og á, at kotavaðmal fæst til keyps.

Í juni 1890 stóð henda lýsing í Føringatíðindum: „Almikið kotavaðmal kann seljast í Havn til góðan prís, um tað er væl úr hondum komið. Óvanda vaðmal vil eingin keypa. Vaðmal til vakstramannakot eigur at vera 5 alin langt og 1 alin breitt".

Í juli 1892 er aftur eitt hjartasuff um kotavaðmal: „Kotavaðmal er nú ikki at fáa í Havn, hvørki fyri góð orð ella peningar. Tað vadmal, sum hevur verið í krambúðunum herfyri, hevur illa verið athyggjandi, bæði av óvanda ull og illa tøvt."

**Knappatroyggjan**

*Lucas Debes* sigur einki um troyggjuna. *J.Chr. Svabo* skrivar um stuttan svartan vaðmalsvest, ið verður brúktur uttan á randutum kalamankesvesti. Hann sigur tó einki um knappar. *J. Landt* harafturímóti gevur greiða frásøgn um troyggjuna: „Til daglig Brug haves nu i de senere tider næsten almindelig en ulden Trøje, som er bunden eller knyttet af flere Kulører, men den opskjæres foran og bruges snart med, snart uden Overslag, men dens Kanter og Knaphuller belægges med røde uldne Bånd, og dens Knapper er af Been eller støbte af Tin".

*C.J. Graba* skrivar einki um knappatroyggjuna. *H.J.J. Sørensen* sigur troyggjuna vera myrkabláa og bundna.

*H.M. Debes* skrivar: „Tað mest vanliga nú á døgum er antin myrkablá einlitt ella myrkablá og ljósablá troyggja, men í seinastu øld og longri aftur í tíðina var vanligt við reyðum og bláum troyggjum". H.M. Debes sigur brúðgómstroyggjuna hjá langabba William Heinesen vera reyða og bláa við tí stóra stríputa mynstrinum, sum stendur í bindibókini.

*Elsa Bærentsen* gevur í Varðanum greiða og góða frágreiðing um einlitta knappatroyggju eftir frásøgn frá Binu á Hellu í Kvívík.

Fornminnissavnið eigur fleiri knappatroyggjur uml. 150 ára gamlar. Eina myrkamorreyða kotalíknandi, við 12 tinknappum hvørjumegin, við myrkabláum knappholum, kantaðum við myrkabláum bregdaðum bandi. Eina heilt myrkabláa, ið gongur yvir í tað svarta, við 14 knappholum og 13 messingarknappum hvørjumegin. Troyggjan hevur repskant framman og um kragan. Eitt skreyteintak. Eina aðra heilt myrkamorreyða yvir í tað svarta við 11 knappum og knappholum hvørjumegin, eitrandi fínt spunnan og bundna.

Knappatroyggjan nú á døgum er myrkablá einlitt, aloftast úr føroyskum tógvi, tøvd og litað ella mynsturbundin myrkablá og ljósari blá, ofta úr útlendskum tilfari. Tann blái liturin er vorðin í so fagur í mun til tann vakra indigobláa. Mynstrini, ið brúkt verða, finna vit í „Føroyskum bindingarmynstrum". Mynstur nr. 1 undir „mannstroyggjumynstrum" verður ofta kallað kirkjubømynstrið eftir troyggjuni hjá Jóannesi bónda. Troyggjan hevur 12 knapphol og 12 silvurknappar hvørjumegin, verður heft í ovastu knappholum hvørjumegin við stimaknappum úr silvuri. Í einstøkum føri havi eg sæð troyggju við eyka silvurstima niðast um. Knappholini verða seymað við reyðum ella tí myrka botnlitinum í troyggjuni, eins og kantað verður við bregdaðum bandi upp framman og um kragan.

**Vesturin**

*Lucas Debes* sigur einki um vestin. *J.Chr. Svabo* skrivar at „der bruges en kort stribet kalamankesvest“. – *J. Landt* sigur einki um vestin. *C.J. Graba* sigur vestin vera úr svørtum klæði við reyðum knappholum. *H.J.J. Sørensen* sigur, at vesturin er antin úr bláum ella svørtum klæði.

*H.M. Debes* skrivar: „Reyður broderaður vestur er, so vítt eg veit, ikki komin í brúk fyrr enn seinrapartin av seinastu øld, men tað sum nógv hevur verið brúkt her í Føroyum, í hvussu er í eini tveyhundrað ár, er svartur silkivestur til stás. Men til dagligt vóru brúktir vovnir vestar – spølaðir tvørturum og litaðir í ymiskum plantulitum“. Um knapparnar sigur hann, at teir antin vóru heimagjørdir úr tini ella úr glasi, keyptir úr handlinum.

*Andrias Djurhuus* er ikki samsintur við H.M. Debes um tann reyða vestin. Í Kvinnutíðindum 9. mai 1963 vísir hann á, at í skiftinum eftir „Sysselmand Zachrias Joensen, Sandevaag år 1754. 12. Marts“ finna vit:

| | |
|---|---|
| 1 Rød Vest med sølvknapper | 9 fl. 10 sk. |
| 1 Ditto af Vercken | 1 fl. 10 sk. |

Fornminnissavnið eigur fleiri vestar, ymiskar av tilfari og útsjónd, úr fínastu hvítu bummull – teir hava møguliga verið brúktir til donsk klæði – eisini randutan í ymiskum litum, svartar einlittar, svartan broderaðan við reyðum rósumynstri niðast um (maskinbroderaðan), svartan broderaðan við smáum ljósum bløðum um alt framstykki, hvítan broderaðan við blómum og bløðum upp framman, um lummarnar og fremst um



kotakragan. Hesin vestur varð brúktur til donsk klæðir 1918. Fleiri reyðar vestar, ymist broderaðar, barnavest frá 1907, broderaður til kongsvitjanina, og ein reyðan vest, sum umframt at vera broderaður, hevur revers og kotakraga eins og teir, eg havi sæð í Kirkjubø. Hesin vestur er ikki gamal og er helst broderaður eftir kirkjubøvestinum.

Í Føringatíðindum nr. 7 juli 1890 kunnu vit lesa hesa lýsing: „Baldýraðir skarlaksvestar til brúdleyps og høgtíðsbúna fáast hjá Helenu Padurson. Greiniligari hjá Jens Olsen“.

Vesturin í dag er svartur, reyður og í einstøkum føri hvítur til brúðgómsvest. Kragin og framman eru úr klæði, aftan- og innanfóðrið av fóðurtoyi, oftast lasting, men eisini

bummull ella silki. Framstykkini eru sneidd niður framman, tveir eru lummarnir, og kragin er kotakragi. Vinstrumegin eru 6 knapphol, seymað við sama liti sum vesturin, upp frá í neðra, og høgrumegin 6 silvurknappar. Ymist er, um knapphol og knappar eru undir kotakraganum ella eingi. Aftan er spenni og tampur, so til ber at víðka ella treingja um vestin. Broderíini eru vanliga upp framman, um lummarnar og fremst á kotakraganum. Mynstrini eru ymisk. Í einstøkum ættum verður hildið fast við sama mynstur.

**Buksurnar**

*Lucas Debes* skrivar einki um buksur. *J.Chr. Svabo* skrivar, at buksurnar eru svartar og víðar, opnar niðan fyri knæ, snørdar við lissum. Framman er víð splitta uttan knappar, sum altíð stendur opin, serliga sjónlig av tí hvítu stúkuni. J.Chr. Svabo heldur tað hevði sæð betur út við klaffa framman, men ivast í, um føroyingar fáast til at skifta móta, tí sum hann sigur, „vani bítur best".

*J. Landt* skrivar tað sama sum Svabo. *C.J. Graba* sigur tær víðu buksurnar úr svørtum klæði røkka niður um knøini og lummarnar vera prýddar við reyðum og blonkum knappum. *H.J.J. Sørensen* sigur buksurnar vera úr svørtum vaðmali við blonkum knappum.

*H.M. Debes* nevnir ikki buksurnar.

Buksurnar eru nú vanliga kvarðabuksur, tó havi eg sæð knæbuksur við splittu. Kvarðabuksurnar eru úr heimavovnum vaðmali ella svørtum handilsklæði. Framstykkið í erva, eisini kallað kvarðin, er í tveimum, eins og á vanligum buksum. Knappað verður á miðjuni við tveimum knappum niðureftir, ovari knappurin er svartur og niðari blankur stimaknappur úr silvuri. Umframt miðknappin í erva eru tveir hvørjumegin til selarnar og tveir aftan. 11 cm niður frá ovara kanti framman eru tveir svartir knappar hvørjumegin stimaknappin.

Niðan fyri hesa røð av knappum eru innseymaðir (paspoleraðir) lummar, ein hvørjumegin. Klaffin (lúkan, slagið) hevur 5 knapphol, tey 3 á miðjuni venda upp og niður, tey í horninum venda upp á skrá. Klaffin verður kneptur niðan á kvarðan. Niðast um brøkurnar er „sliss", fýra knapphol, 4 silvurknappar, tampur og silvurspenni. Talið á knappum og knappholum kann vera ymist, bæði trý og fimm.

**Stúkan**

*Lucas Debes* sigur stúkuna vera ullinta, hendingaferð úr lørifti. *J.Chr. Svabo* sigur vanligu stúkuna vera hvíta, ullinta, kvarðaða við bláum klæði. Um sunnu- og halgidagsstás sigur hann: „Linnedet bestaaer i en Natskjorte, og én fiin Klud om Halsen, og for de fornemste Bønder Hals-Krave og Halv-Ermer". Linnedet merkir í hesum føri undirklæði og náttskjúrtu, plaggið, ið er næst kroppinum, í hesum føri úr lørifti.

*J. Landt* sigur vanligastar vera fínar hvítar ullintar stúkur, kvarðaðar við bláum, bert onkur hendinga ríkmaður eigur løriftsskjúrtu.

*C.J. Graba* sigur einki um sjálva stúkuna, men sigur útróðrarmannin lata seg í roð-

stúkuna eins og í eina stúku við tað, at hon er seymað soleiðis. *H.J.J. Sørensen* sigur mannfólkini brúka ullinta stúku.

*H.M. Debes* sigur einki um stúku.

Fornminnissavnið eigur stúku og hálvermar. – Mamma segði mær, at langabbi, Joen M. Lamhauge (f. 1874, d.1934), ongantíð átti skjúrtu. Brúkti fína ullinta stúku, læt seg úr henni, tá ið hann fór í song, og svav nakin. Til stás hevði hann leysan hálskraga undir sjóstúkuni. Kragin var stívur og røkk niður á bringu. Undir kraganum hevði hann prýðishálsklút. Abbi, Jákup Lamhauge (f.1874, d.1958), átti heldur ikki skjúrtu, fyrr enn mammubeiggjarnir vuksu til uml. 1915-20. Abbi brúkti myrkabláa troyggju við messingarknappum.

**Hálsklútur**

*Lucas Debes* sigur einki um hálsklút. *J.Chr. Svabo* sigur, at brúktur verður antin hálsklútur úr hvítum lørifti ella turriklæði. *J. Landt* sigur frá hvítum hálsklúti ella ymist littum kattunsturriklæði. Eisini sigur hann brúðgómshálsklútin vera frynsaðan og prýddan við reyðum silkibondum.

*C.J. Graba* sigur einki um hálsklút. *H.J.J. Sørensen* nevnir bert „Krave og Flipper". *H.M. Debes* sigur einki um hálsklút.

*Jóhanna M.S. Hansen* sigur í „Gomlum gøtum I" frá gamlari konu í Mykinesi, at har høvdu tey brúkt nakað, ið kallaðist vinarturriklæði. Sjálv mintist Jóhanna M. S. Hansen bert svørt turriklæði, ið bundin vóru um stúkukvarðan, ið var so høgur, at hann kundi brótast niðuryvir.

Í dag verða brúktar hvítar handilsskjúrtur oftast við svørtum slipsi.

## *Høvuðbúnin*

**Stavnhettan**

*Lucas Debes* sigur einki um, hvat mannfólkini høvdu á høvdinum.

*J.Chr. Svabo* harafturímóti gevur greiða frágreiðing um húgvur og stavnhettuna. Stavnhettan, ið er stásplagg, sigur hann, sær soleiðis út:

„Hoved-Tøjet er en Bonde Hat (Hetta) af fiint sort Vadmel eller Klæde (see Art. om Haandværker). Denne Hat er den fuldkomneste ieg kjender, siden den kan bruges paa 3 Maader, neml. a) Naar den har sin rette Opsats, da den bruges til Stads. Den haver 2 opstaaende store Spidser (Stavnur) og en liden foran. Pulden, som bedækker Hovedet, er belagt med en Art af sorte Traad Kniplinger; ligeledes Stavnenes Kanter. I denne Opsats synes den at klæde de fleste vel, især et bredt, eller Grenadeer-Ansigt. b) Naar den nedslaaes, beskjærme Stavnene baade Hals og Bryst for Regn og Kulde. c) Naar Stavnene, samlede, legges paa Nakken, bruges den, som et *Negligé.* Hertil bruges kun de gamle og udslidte Hetter, siden de derved tabe deres Stilling og Anseelse."

Um húgvurnar sigur hann: „Paa Hovedet bruges gjerne enten en af de Polske Skind-Huer, eller en strikket Hue af adskillige Farver, og Huer af stribet Hvergarns Tøj; undertiden og en gammel *Hetta*".

*J.Landt* skrivar um „Hat eller Hætte af sort Klæde, denne har for og bag 2 Spidse eller



Stavne, der rejser sig 1/2 alen i Vejret og Kanterne paa disse Stavne ere prydede med en slags Stive og smale Kniplinger."

Sum vit síggja, samsvara frágreiðingarnar ikki heilt. J.Chr. Svabo sigur frá trimum stavnum og J. Landt frá tveimum.

*C.J. Graba* skrivar, at húgvurnar eru seymaðar úr fínum ullintum vanliga reyð- og bláteinutum klæði, tær eru kelvirundar og o.u. 9 tummar høgar og sera bæriligar. C.J. Graba nevnir ikki stavnhettuna, men sigur frá húgvu úr tjúkkum svørtum vaðmali, ið fjalir pannu og vangar. Hetta er helst hettan.

*H.J.J. Sørensen* skrivar, at „paa Hovedet har de en let vævet, smaastribet Hue."

*H.M. Debes* skrivar, at til sjóstúkuna klæðir best dimm húgva ella stavnhetta.

*Nólsoyar Páll* letur *Jákup á Møn* í tríkantaðan hatt.

Fornminnissavnið eigur bæði gamlar og nýggja stavnhettu.

*Petra Djurhuus* hevur í bókini „Føroyar I" skrivað hesa frágreiðing um ta gomlu stavnhettuna. Petra Djurhuus er eitt sindur í iva um frágreiðingina hjá J.Chr. Svabo.

„Hvussu Svabo kemur til hetta úrslit viðvíkjandi nýtslu av stavnhettuni, er ikki væl skiljandi. Her kundi heldur hugsast um ta nú nýttu hettuna, sum tó ongastaðni verður nevnd og tykist at vera høvundunum ókend.

Fornlutasavnið eigur tvær stavnhettur frá gamlari tíð av svørtum einskeftaðum vaðmali. Innast er ein rundur kollur av filti, klæddur við vaðmali og 6 røð av svartari, ullintari agraman krossað niður yvir kollin, so hann verður býttur í 6 partar. Uttan á kollinum eru so stavnarnir, 24 cm høgir aftan og framman og sneiddir niður á liðina til 11 cm. Vaðmali er í 2 stykkjum við seymi mitt niður eftir, har stavnurin er hægstur og lagt inn á kollin í neðra. Á sama hátt eru stavnarnir klæddir innanfyri og agramanin sett runt um kantin. Fyri framman er so strúturin, ein tríkantur, 32 cm langur og 6 cm, har hann er hægstur, klæddur innan og uttan við



agraman um. Alt er stívað av við tættsettum fiskabeinum til at halda stavnarnar og strútin uppi. At benda teir niður til verju ímóti veðri er ógjørligt, og sum nátthúgva er stavnhettan illa hugsandi, sjálvt um hon er gomul og slitin, so hon hevur mist sín „Stilling og Anseelse. Svabo er tann, sum fyrstur nevnir ta spølutu húgvuna, sum enn er í brúki".

Fornminnissavnið eigur bæði reyðar og bláspølutar húgvur.

Tað vanligasta í dag er reyð- ella bláspølað húgva, í einstøkum føri stavnhetta og tá í sambandi við sjóstúku. Húgvan verður seymað á sama hátt nú sum fyrr, rykt saman við 13 rukkum ella føllum. Sjálv havi eg hildið á húgvum við rukkutali frá 20 niður í 8. Húgvan er fóðrað við svørtum lastingi og millumfóðrað við stívlørifti. Nútíðarhúgvan er stívnað í sniði í mun til tær, vit síggja á gomlum myndum. Hetta kemst av, at húgvan verður samanløgd og fest, so rukkurnar koma niður á hálva húgvuna. Húgvan verður grynri og er mest at rokna sum prýðishúgva í mun til tær gomlu. Húgvan í dag skal helst venda beint aftur og fram, men áður vendu tær líka gjarna tvørturum.

Á mynd av bátsmanning frá uml. 1900 síggja húgvurnar so tilvildarliga út, at mær renna til hugs orðini hjá Chr. Matras: „...ym-

isk er gongd og húgvuburður, har tey tyrpast í bólk".

**Hosurnar**

*Lucas Debes* sigur hosurnar vera gráar ella morreyðar. *Chr. Svabo* sigur hosurnar vera svartar. *J. Landt* sigur hosur verða bundnar úr svertaðari ull, vera gráar ella „yssede" (graalig graasprængt).

*C.J. Graba* sigur hosurnar verða bundnar úr svørtum, gráum og bláum tógvi, sera langar og tjúkkar. *H.J.J. Sørensen* sigur hosurnar vera bláar, hvítar, ella „isprængt (pletter, stænk af noget)", møguliga loppumynstur.

*H.M. Debes* sigur frá langabba sínum, at til hægsta stás brúktu menn hvítar hosur, tað næstbesta vóru ljósabláar, tær seyðalittu vórðu bert havdar til gerandisbrúk. Eisini sigur H.M. Debes frá dimmbláum leggaldi við hvítum loppumynstri, hetta skulu hava verið brúðgómshosur í Klaksvík. Mynsturtráðurin var úr bummull.

*Nólsoyar Páll* letur Jákup á Møn í hvítar hosur av koltursgarni.

Í Hundatátti verður sagt við bóndan, at hann skal ikki halda seg vera nakað fyri tí, um hann eigur strípután og morreyðar hosur.

Fornminnissavnið eigur hosur, bláar, bundnar eftir tí sokallaða Dalsgarðsmynstrinum úr Skálavík. Tær hava rangeyga aftan við avtøkum, eru mynsturbundnar við rongum og røttum oman fyri øklaknútin. Mynstrið verður eisini kallað krúnan.

Maður úr Hesti sigur seg hava funnið hosu, tá ið hann fór at høgga út í kjallaranum 1951. Hann metti hosuna at vera um 65 ára gamla ella eldri. Hosan var steinamosað, hevði mynsturbundna krúnu áraka øklaknútin. Mynstrið var tað sama sum á teimum fronsku sokkunum, sum tá vórðu bestiltir úr Paris.

Hanus bóndi í Saksun, giftur seinnu helvt av 19. øld, var í hvítum bummullarhosum, tá ið hann giftist.

Hosurnar í dag eru aloftast bláar ella myrkamorreyðar, í einstøkum føri hvítar; tær verða bundnar slættar við avtøkum og rangeyga aftan, í einstøkum føri við rangbundnum mynstri oman fyri øklaknútin.

Í gomlum døgum var litað blátt við indigo. Hetta er litevni, ið ikki uppleysist í vatni, men í súrum landi. Seinni kom Kromans liting, ógvuliga nógv brúkt fyri seinasta heimsbardaga.

Funningsmaður skuldi siga um elduvíking, ið var komin í kirkju, at Elias var komin til bíggjar í sera vøkrum klæðum, men Kromann átti beinini.

**Hosubondini**

*Lucas Debes* sigur einki um hosubondini.

*J.Chr. Svabo* sigur brúkt verða „fine stribede Strømpebaand af adskillige Farver, hvis Ender (Skygving) hænge uden for til Stads". *J. Landt* sigur tey vera „stribede og tætvirkede". Ikki er lætt at vita, um „virkede" í hesum føri meinast við vovið ella tað, vit í dag kalla virkað.

*C.J. Graba* sigur leðurreim verða spenta oman fyri knæ til at halda hosunum uppi. *H.J.J. Sørensen* sigur einki um hosubond.

*H.M. Debes* nevnir tey, men ikki hvussu tey síggja út.

Fornminnissavnið eigur ymisk hosubond,

bæði vovin og virkað. Tey vovnu eru vanliga úr tvisti, ella tvisti við ullintum spølum og teinum, tey virkaðu eru úr ullintum. Munurin ímillum tey vovnu og tey virkaðu í útsjónd, umframt tilfarið, er, at á teimum vovnu ganga spølirnar eftir longdini, men á teimum virkaðu ganga spølirnir á skrá inn ímóti miðjuni. Vanligt hevur verið í Føroyum eins og í Íslandi við fótvovnum bondum, tað eru bond vovin við hond og fót, uttan onnur amboð. Í útsjónd eru tey eins og tey, ið vovin verða í vevi. Kona, ið vav fótvovin bond, segði mær, at tey vóru spølut, tent og teinað. Sum oftast hava tey vovnu verið hvít við ymist littum spølum og teinum. Hosubondini til konufólk vóru tey somu, bert smalri. Hosubondini í dag eru oftast virkað, í einstøkum føri vovin, litirnir eru ymiskir, oftast flagglitirnir.

**Fótbúnin**

*Lucas Debes* nevnir bara húðarskógvar. *J.Chr. Svabo* og *J. Landt* siga frá rotu- og húðarskóm. *C.J. Graba* sigur frá skóm úr gulum barkaðum roði so tunnum, at tærnar kunnu nýtast ógvuliga væl, tá ið klivið verður, har illgongt er.

*H.J.J. Sørensen* sigur frá blonkum leður og rotuskóm.

*H.M. Debes* sigur, at fyrr í tíðuni vóru fáir, ið áttu spenniskógvar.

*Nólsoyar Páll* letur Jákup á Møn hava „spenni á danskar skógvar".

Fornminnissavnið eigur tvey pør av spenniskóm, men tey eru ikki gomul.

Skómakarar í Føroyum hava sjálvir seymað spenniskógvar. Jóan Jakku Joensen skósmiður sendi handseymað skógvapar til verksmiðju í Finnlandi í tríatiárunum; haðani fingu teir skógvar til skósøluna, til vetrarkríggið brast á. Seinni hava tey fingið skógvar úr Onglandi, Danmark og nú úr Noregi.

**Tólvtáttaband**

J.Chr. Svabo sigur mannfólkini altíð hava knív í træslíðrum í lummanum. Eingin av áður endurgivnu persónum siga nakað um knív ella bond í sambandi við stásklæði.

Lorvíks Páll hevur slíðraband, men er hann tá í vásaklæðum. „Bindur hann um seg slíðraband,/ fast við brøkur svartar,/ stórur knívur við svørtum skafti /við vinstru síðu dartar".

Nú er vanligt við tólvtáttabandi, bæði við og uttan knív. Knívurin er oftast ein prýðisknívur í útsjónd eins og grindaknívur við innløgdum mynstri, bert minni.

Gomul kona segði mær, at fyrr søgdu tey at flætta tólvtáttaband, nú hoyrist ofta, at tey tólvtra eitt tólvtráðaband. Í einum tólvtáttabandi eru tólv tættir, hvør tátturin kann hava fleiri træðrir, hetta veldst alt um tógv og tjúkt. Litirnir eru ymiskir, ofta flagglitirnir.

**Frynsamuffur ella kubbar**

Frynsamuffurnar hava helst verið fínari enn kubbarnir; tær vóru fyrst bundnar, síðani broderaðar og frynsaðar frammanum. Kubbarnir vóru bundnir sum vanlig long rond. Frynsamuffur vóru í einstøkum førum brúktar til langt upp í tríatiárini, og kubbarnir uppaftur longur og tá helst til arbeiðisella skipsbrúk. Nær byrjað verður at brúka frynsmuffur ella kubbar, er ilt at siga. Um



Lorvís Páll verður sagt: „Morreyðar kubbar á skøvning dregur, /spunnar úr tveimum tráðum“, og um Jákup á Møn: „Bláa troyggju fór hann í, /muffur fram yvir fingrar“. Tá ið J. P. Gregoriussen yrkir „Gentukæti“ síðst í 19. øld, er hetta helst við at fara av móta, ella í minsta lagi hildið at vera „bygdarligt“ eftir yrkingini at døma. „Á landsbygd har brúka teir kubbarnar enn, /í Havn ganga ungligar klæddir sum menn, /við hvítum mansjettum og gullknøppum í, /á landsbygd, á landsbygd, á fý, á fý, á fý.“

Fornminnissavnið eigur vakrar frynsamuffur, ljósar, broderaðar við reyðum og svørtum. Fornminnissavnið eigur eisini eina mynd av ungum manni við frynsamuffum, tikna síðst í tríatiárinum. Í dag finst neyvan nakar, ið brúkar frynsamuffur ella kubbar til stás.

**Tumlahandskar**

*H.M. Debes* skrivar: „Til tann rætta føroyska búnan hoyrdu tumlahandskar. Teir vóru bundnir einkulpatent úr bummullargarni og bundnir beint upp og niður – óavtiknir – frá alboganum og oman á knúgvarnar og við tumli á.“ *Jóhanna M. Skylv Hansen* skrivar um nankingshandskar. Hvørki teirra sigur, nær hetta hevur verið brúkt, ella nær hildið verður uppat at brúka handskar.

Fornminnissavnið eigur fleiri pør av longum hvítum handskum, bundnum úr bummullargarni. Hesir eru innkomnir í fyrstu innsavningartíðini ymsastaðni frá. Tíverri er ov lítil frágreiðing um handskarnar.

**Silvur ella stakkastá**

*Lucas Debes* skrivar um gylta brosju við leyshangandi bløðum; brosjan er fýrkantað sum ein rútari. *J.Chr. Svabo* og *J. Landt* skriva um somu brosju, harumframt um silvurmallur, áseymað belti við silvurkúlum og silvurspenni. *C.J. Graba* sigur frá tinringum (mallum). *H.J.J. Sørensen* nevnir hvørki silvur ella stakkastás. *H.M. Debes* sigur frá stakkastási úr reyðargulli uml. 300 ára gomlum og annars frá silvurbelti, mallum og stakkanál.

Fornminnissavnið eigur stakkastás frá uml. 1720, bæði brosju og belti.

Við silvuri eins og teimum føroysku klæðunum sum heild hava ongar ávísar rammur verið sum til dømis í Noregi, har brosjan hevur navn eftir búnanum. Prýðislutir úr silvuri, annaðhvørt tað eru knappar, brosja, mallur, spenni ella belti, hava ofta verið keypt í útlondum. Úr Noregi kom sólju-

brosjan, úr Skotlandi tistilbrosjan. Ungar gentur, ið fóru til Danmarkar aftan á seinasta heimsbardaga, høvdu til fragd at fara í forngripahandlar at leita eftir silvuri. Sjálv var eg so heppin at finna brosju og gamalt silvurspenni við reyðum og grønum steinum og langa urketu til stima.

Í Føroyum hevur bæði verið teknað og smíðað úr silvuri. Niels L. Arge ursmiður hevur gjørt fleiri mynstur, og Janus Kamban listamaður teknaði mynstur, sum Aage Dahl ursmiður læt til Danmarkar at gera. Umframt hesar eru tað fleiri, sum bæði hava stoypt úr silvuri og tini. Silvurbúðirnar hava innflutt silvur við ymiskum mynstri. Í dag ber til at keypa silvur, evnað til í Føroyum, ofta hóskandi saman í mynstri til allan búnan. Av somu ávum verða silvurlutir íðuliga nýttir til dóps- og fermingargávur.

Eins og við silvurinum hava ongar ávísar rammur verið fyri búnanum. Til ber innan fyri ávíst mark at gera sum einum sjálvum lystir. Hóast hetta hava tað verið óskrivaðar reglur um lit, til sorg ella gleði. Til veitslu reyður ella hvítur vestur, húgvan reyð, einkjumenn og eldri menn undantiknir. Til jarðarferð dimm húgva og svartur vestur. Konufólk hava ikki í seinni árum brúkt føroysk klæðir til jarðarferð.

Tað, at ongar fastar rammur eru um, hvussu klæðini ella búnin eigur at vera, og hvussu hann eigur at brúkast, kann hava sínar vansar, so tað siðbundna fer á glið. Nú fáa ungir menn sær svartan vest til veitslubúna, og menn í miðalaldri fáa sær fagurlitt mynstur í svartan vest.

Tað gátuføra við teimum føroysku klæðunum er, at hóast tey í mong ár bert vóru brúkt av einstaklingum til ávísar tíðir, duttu tey ongantíð burtur. Er hetta tjóðskaparrørsluni fyri at takka, ber tó ikki til at býta eftir politiskari sannføring, tá ið tey sum onga broyting ynsktu, kanska hava verið tey trúgvastu ímóti klæðunum. Ongantíð í Føroya søgu hava klæðini verið so almenn og stásilig sum nú, nýtt á eini og hvørji hátíð ella veitslustund.

**Heimildir**


*Andersen, Ellen:* Danske Dragter. Moden i 1700-årene, bls. 134. Nationalmuseet. København 1977.

Bíblian. Jóhs. kap. 19, v. 23. Mós. 2, kap. 39, v. 1-39.

*Bærentsen, Elsa:* Einlitt knappatroyggja. Varðin bind 42, 119-125. Tórshavn 1974.

Føroysk Bindingarmynstur. Bundnaturriklæði. Føroyskt Heimavirki. 'órshavn 1983.

*Debes, Hans M.:* Føroyski búnin. Jólastjørnan, bls. 5-8. Tórshavn 1966.

*Debes, Hans, M.:* Føroysk Bindingarmynstur, bls. 17. Føroyskt Heimavirki. Tórshavn 1969.

*Debes, Lucas:* Færøernes Beskrivelse, bls. 249-251. Udgivet for Selskabet til Udgivelse af færøske Kildeskrifter og Studier af Jørgen Richel. Facsimiligeudgave. København 1963.

*Djurhuus, Andr.:* Kvinnustás. Kvinnutíðindi nr. 9. Tórshavn 1962.

*Djurhuus, Jens Chr.:* Føroya kvæði VI, bls. 351-469 Kopenhagen 1972.

*Djurhuus, Petra:* Føroyski klæðnabúnin. Føroyar I, bls. 352-357. Dansk-Færøsk Samfund. Keypmannahavn 1958.

Føringatíðindi 1890-1906, 1969:
Almikið kotavaðmal, nr. 5 mai 1890.
Kotavaðmal, nr. 7 juli 1892.
Gømul vevkona, nr. 11 juni 1987.
Brita, nr. 12 juni 1897.
Offsett-prent, Emil Thomsen, Tórshavn 1969.

*Graba, Carl Julian:* Dagbók skrivað á eini ferð til

Føroya í árinum 1828, bls. 32-33. Eyðun Winther týddi. Tórshavn 1987.
*Gregoriussen, Jóan Petur:* Gentukæti, bls. 392-393. Songbók Føroya fólks. Tórshavn 1983.
*Hansen, Johanna Maria Skylv,* 1968: Føroyafólks búni. Gamlar Gøtur I, bls. 62. Tórshavn.
*Joensen, Jóan Pauli,* 1977: Mondul nr. 3. Føroya Fornminnissavn. Tórshavn.
*Kongsstovu, Marianna í,* 1978: Traditional Faroese Dress, Faroe Isles Review, Volume 3, No 1. s. 24-37. Bókagarður. Tórshavn.
*Landt, Jørgen:* Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne, Kiøbenhavn 1800. Bls. 239-242. Einars Prent og Forlag. Tórshavn 1965.
*Nolsøe, Poul (Nólsoyar Páll):* Jákup á Møn. Føroya kvæði VI, bls. 332. Kopenhagen 1972.
*Svabo, Jens Chr.:* Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782, bls. 244-247. Selskabet til Udgivelse af færøske Kildeskrifter og Studier. København 1959.
*Sørensen, Hans J.J.:* Den færøske klædedragt. Fra Færøerne/Úr Føroyum VI, bls. 117-118. Dansk-færøsk Samfund, København 1971.
*Thorsteinsson, Arne,* 1977: Mondul nr. 3, s. 7-21. Føroya Fornminnissavn. Tórshavn.
Hundatáttur. Føroya kvæði, bd. 6, nr. 229, s. 448-469.

Nicolina Jensen
Føroya Fornminnissavn
FR-188 Hoyvík

**Munnligar frásagnir**

Arge, Thomas, ursmiður, Tórshavn.
Bærentsen, Dánjal J., frv. landsdjóralækni, Tórshavn.
Dahl, Aage, ursmiður, Tórshavn.
Dam, Solveig, Skósølan hjá Jóan Jakku Joensen, Tórshavn.
Jensen, Mona, seymikona, Tórshavn.
Joensen, Jóan Pauli, fil. dr., Tórshavn.
Johansen, Súsanna, húsmóðir, Strendur.
Vági, Annefía í, skjalavørður, Tórshavn.

**Summary:**

Faroese national dress has never before been so widely used and so elegant. It is commonly worn on formal occasions and at a variety of social events and functions. This article presents excerpts from written sources back to the 17th century which mention or describe Faroese clothing. From these sources it can be seen that, apart from certain minor changes, traditional Faroese dress is much the same today as it has always been.